gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Til USA í sambandi við oljuvinnu

**Tveir føroyingar, sum arbeiða hjá amerikanskum felag í Norðsjónum, fara fríggjadagin til USA at úbúgva seg víðari í frálandavinnuni**

OLJUVINNA
*Edvard Joensen*
*Aberdeen:*

Tveir ungir føroyingar, sum eina tíð hava arbeitt hjá amerikanskum felag á einum flótikrana í Norðsjónum, fara fríggjadagin til USA at útbúgva seg víðari. Meðan teir hava arbeitt í Norðsjónum, hava teir verið við til at stýrt kavbátum í samband við festan av boripalli.

Havnarmenninir Høgni Hansen og Henrik Kølleskov hava í vár arbeitt hjá amerikanska felagnum Oceaneering í frálandavinnuni. Teir eru komnir í samband við ensku deildina hjá Oceaneering gjøgnum samstarvið, felagið hevur við føroyska felagið Atlantic Diving.

Høgni Hansen sigur, at teir hava verið umborð á einum stórum hollendskum flaka og havt eftirlit við smáum kavbátum, sum stýra niðurseting av festi til boripallar.

Høgni greiðir frá, at flakin, Thialf, sum teir hava verið umborð á, meðan teir hava arbeitt í Norðsjónum, hevur heimsins størstu flótikranar. Tveir kranar, sum hvør lyftir 7.000 tons.

Uppgávan hjá havnarmonnunum báðum var at fylgja við, meðan steyrar til festan av einum boripalli vórðu slignir niður í botnin.

– Og tað eru ikki bara hissini steyrar, sigur Høgni Hansen. Teir eru 60 metrar langir og tveir metrar í diametur. Teir vórðu slignir 55 metrar niður í sandbotnin, so bara fimm metrar standa uppundan at festa í.

Eftirlitið við arbeiðinum verður gjørt við ein telduskýggja umborð á flakanum. Haðani verður ein lítil kavbátur, ein sonevndur ROV (Remothy Operated Vehicle), sum er útgjørdur við videotólum, stýrdur.

Høgni Hansen sigur, at teir vóru í grundini bara praktikantar. Royndarsettir. Av tí sama sluppu teir ikki at stýra arbeiðinum sum so, men sluppu tó onkuntíð at taka í »joystikkið«.

– Tað var líkasum at spæla við eitt telduspæl, hóast kostnaðurin hevði verið av heilt øðrum dimensiónum, um tað endaði galið, sigur hann.

Men teir munnu hava klárað tað, teir skuldu, heldur Høgni Hansen, tí teir eru báðir settir í starv hjá Oceaneering. Og fíggjadagin fara teir til USA á skeið, har teir skulu fáa undirvísing, so teir kunnu arbeiða sjálvstøðugt við kavbátunum.

Høgni Hansen sigur, at teir skulu millum annað venja í simulatori, umframt at teir skulu læra at viðlíkahalda bátarnar.

Tá teir eru lidnir við skeiðið í USA, koma teir heim aftur og fara tá at arbeiða á føroyskum sjóøki, har Oceaneering hevur fingið sáttmála í samband við oljuleitingina undir Føroyum. Væntandi verða tvær manningar til arbeiðis, meðan leitað verður undir Føroyum, sigur Høgni Hansen, tí kavbátarnir skulu helst vera í drift allar 24 tímarnar í samdøgrinum.

Hann sigur, at sáttmálin, teir hava gjørt við Oceaneering, er rímiliga góður. Lønin er í lagi, sigur hann, og teir skulu arbeiða einar 200 dagar um árið og hava so frí restina av tíðini.



*Sosialurin hitti Høgna Hansen á flogvøllinum í Aberdeen á veg til USA at útbúgva seg í frálandavinnu*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Bónus í nýggjum hami



*- Bónus er tann bíligasti matvøruhandilin í landinum framvegis, sigur Niels Mortensen, stjóri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Nýggj høli, nýtt innbúgv, góð parkeringsviðurskifti og landsins lægstu prísir**

FLYTING
*Turið Kjølbro*

Í dag letur matvøruhandilin Bónus í Havn upp í nýggjum hølum. Tað er í niðaru hædd í stóra bygninginum hjá Postverkinum í Óðinshædd. Handilin fer at ráða yvir 710 fermetrum í mun til 550 fermetrar í verandi hølum við Smyrilsvegin. Orsøkin til, at handilin flytir er, at gomlu hølini eru niðurslitin, eins og parkeringsviðurskiftini í seinastuni ikki hava verið nóg góð.

- Tað verður léttari hjá fólki at koma til handilin nú. Bæði innan- og uttandura verður rúmligari, sigur Niels Mortensen, stjóri.

Innbúgvið í nýggju hølunum er alt nýtt. Deildin við frukt og grønmeti verður tann mest framkomna í landinum. Alt verður kølt niður og ein skipan, sum heldur vøruna fuktiga, verður tikin í nýtslu. Úrvalið og prísirnir hinvegin verða stórtsæð tað sama sum higartil.

Niels Mortensen vil ikki avdúka, hvussu nógv flytingin kostar, ei heldur, hvussu stórur umsetningurin hjá Bónus er á hvørjum ári.

- Bónus er tann bíligasti matvøruhandilin í landinum framvegis, sigur Niels Mortensen.

Á stóra parkeringsøkinum aftanfyri bygningin hjá Postverkinum, er ein stórur goymlsubygningur bygdur til Bónus. Í alt starvast 12 fólk í Bónus.

# Rúsdrekkalógin verður dagførd

**Á Ólavsøku fer landsstýrismaðurin í vinnumálum at leggja fyri tingið uppskot til eina lagaligari rúsdrekkalóg**

LÓGARBROYTING
*John Johannessen*

Í hálvt ár hava embætisfólk í Vinnumálastýrinum arbeitt við einum uppskoti at leggja fyri tingið á ólavsøku, um at dagføra verandi rúsdrekkalóg.

– Rúsdrekkalógin er tíggju ára gomul og treingir til at verða dagførd, so hon verður meira tíðarhóskandi. Tað er neyðugt at fáa nøkur viðurskifti í lógini bloytt eitt sindur upp, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sum eisini hevur ábyrgdina av rúsdrekkalógini.



## Umfatandi arbeiði

Tað ber enn ikki til at fáa at vita nágreiniliga, hvøjar broytingar verða gjørdar í rúsdrekkalógini, tí arbeiðið at fyrireika broytingarnar er ikki liðugt enn.

Landsstýrismaðurin leggur nevniliga stóran dent á, at allar broytingar verða gjørdar í neyvum samstarvi við fyribyrgingarráðið. Hetta ger arbeiðið meira umfatandi, enn um bert nakrir løgfrøðingar í Vinnumálastýrinum skuldu fyrireika broytingarnar.

Men Bjarni Djurholm væntar kortini, at tað fer at bera til at leggja uppskotið til politiska viðgerð í landsstýrinum í næstum.

Eitt av høvuðsendamálunum við broytingunum í rúsdrekkalógini er at skapa ferðavinnuni betri møguleikar.

## Var ikki ófólkaligur

Í Sosialinum í gjár greiddu vit frá teimum avleiðingunum, sum verkfallið kundi fáa fyri alingina í Føroyum. Í tí sambandinum høvdu vit fingið upplýst, at Funningslaks hevði biðið um undantaksloyvi at arbeiða í alibrúkinum fyri at basa ILA-sjúkuni.

Tá søgdu vit, at eigarin av Funningslaks hevði brúkt eitt orðaval ímóti FA, sum ikki gagnaði felagnum. Hetta er skeivt. Tað var ikki eigarin av Funningslaks, sum var ófólkaligur. FA harmast mistakið og sigur, at tað var eigarin av Norðsmolt í Funningsfirði, sum brúkti rættiliga ljótt orðaval ímóti FA.

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Fingu skipsklokkuna upp

**Týsdagin fingu kavararnir í Fugloyarfirði skipsklokkuna av Jólaskipinum upp. Leiðarin fyri verkætlanin er væl nøgdur við úrslitið av kavingini**

SKATTAJAKT
*Eyðun Klakstein*

Nú er skipsklokkan av farmaskipinum, Sauternes, sum sakk í ódnarveðri í Fugloyarfirði í 1941, tikin upp.

Kavarar vóru niðri hjá Jólaskipinum týsmorgunin, og tá eydnaðist teimum at fáa skipsklokkuna upp. Á skipsklokkuni stendur navnið á Sauternes á.

– Hetta var tann týdningarmesti luturin at fáa upp. Nú hava vit tað endaliga prógvið um, at tað er Jólaskipið, sum vit hava funnið, sigur Heri Andreasen, leiðari fyri leitingini.

Tað eydnaðist ikki at fáa myntirnar, sum sigast at verða umborð á skipinum, upp í gjár.

Nú verður sagt frá verri veðri, og tí ivaðist Heri Andreasen fyrrapartin í gjár í, um teir sleppa niður aftur á Jólaskipi í hesi syftu.

Ætlanin var at kava allar dagarnar í vikuni, men tað krevst, at veðrið er gott. Um forsøgin heldur sær, verður ikki kavað aftur hesa vikuna, og sunnudagin fara kavararnir aftur til Danmarkar.



*Komandi dagarnar verður neyvan gjørligt at kava í Fugloyarfirði, tí veðrið verður ikki nóg gott. Men týsdagin eydnaðist kavarunum at fáa skipsklokkuna upp*

# Kular Røtur til Grønlands

**Fyrst í juni mánaði verða Kular Røtur við í føroyskum døgum í Nuuk. Seinasta styrkisroyndin undan ferðini verður á Skála um 10 dagar**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Meðan norðoyastevnan er á skránni í Klaksvík, verða vælumtóktu Kular Røtur við í føroyskum døgum í grønlendska høvuðsstaðnum, Nuuk.

Kular Røtur skulu framføra sínar sangir fyri grønlendingum, og ætlanin er millum annað at framføra eina grønlendska útgávu av Hon er omma mín. Eisini er sjónbandið við sama navni týtt til danskt og verður við á ferðini til Grønlands.

Helst størsta hittið hjá Kulum Rótum, Hon er omma mín, er longu týtt til danskt, enskt, norskt og íslendskt, og aðrir sangir hjá Rótunum eru eisini týddir til skandinaviskt og enskt. Alt hetta er ein liður í at náa út um landoddarnar við tónleikinum.

Í næstum skulu onkrar endurinnspælingar gerast av kendastu sangunum hjá Kulum Rótum, og tað er upp á tal, at føroyski framleiðarin, Óli Poulsen, skal arbeiða við tveimum sangum hjá bólkinum.

## Styrkisroynd á Skála

Seinasta styrkisroyndin hjá Kulum Rótum áðrenn ferðina til Grønlands verður á Skála 26. mai kl. 16.00. Tað vikuskiftið er Strandastevna, og í tí sambandi verður konsert í ítróttarhøllini á Skála.

Trølla-Pætur og hansara familja verða eisini við á konsertini.

Kular Røtur fara at framføra allar sínar kendastu sangir, og onkrir nýggir sangir eru eisini á skránni.

Stórskíggin, sum Kular Røtur hava brúkt nógv á konsertum, verður ikki við á hesi konsertini. Ætlanin er í staðin at syrgja fyri meiri lívligum showi á pallinum.



*Jógvan Hansen og systrarnar, Arnfríð og Rannvá Lützen, eru saman við Brandur Enni sangarar í Kulum Rótum*

# Neyðhjálp við Scaniu

Tá estlendska avloysaraferjan, Scania, fór aftur til Estlands fríggjakvøldið, vóru 25 plattar við klæðum umborð á ferjuni.

Hesi klæði eru neyðhjálp til fólk í eystalondunum, og tey skulu flytast umvegis Estland.

Tað eru Blái Krossur og Sjómansmissiónin, sum hava tikið stig til flutningin av klæðunum.

Scania røkti siglingina um Lorvíksfjørð í tríggjar vikur, og ferjan riggaði stak væl til farleiðina. Nú er Dúgvan farin aftur at sigla millum Klaksvík og Lorvík.

*ek*